## Vágatunnilin og Norðoyatunnilin



# Broytt telefontíð í summar

### Juli og august

Í juli og august er telefonavgreiðslan hjá Vágatunlinum og Norðoyatunlinum broytt.

Til ber at ringja gerandisdagar millum kl. 09.00 og kl. 14.00 á telefon 350200. Eisini ber til at senda teldupost til adressuna: tunnil@tunnil.fo.

Prísskrá og tekningarskjøl eru at finna á heimasíðuni tunnil.fo

**Vit ynskja øllum eitt gott summar!**

VÁGATUNNILIN NORÐOYATUNNILIN

Skansavegur 7, Postrúm 1010, FO-110 Tórshavn, Tel 350200, Faks 350201, www.tunnil.fo



## SØKT VERÐUR EFTIR BIÓMUBINDARA

Tú kemur at røkja nógvar ymiskar arbeiðsuppgávur í gerandisdegnum, og kemur at hava samband við nógv fólk. Tú kemur at loysa arbeiðsuppgávurnar í tøttum samstarvi við leigaran, og kemur at verða settur gjølla inn í arbeiðið í gerandisdegnum.

**VIT VÆNTA AV TÆR**

- At tú kanska hevur royndir frá líknandi arbeiði og kennir til starvsgreinina
- At tú ert skilagóð/ur og megnar at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- At tú ert nærløgd/lagdur, ert røkin og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert ágrýtin og trívist við at hava nógv jørn í eldinum

**VIT KUNNU BJÓÐA**

- Eitt avbjóðandi og fjøltáttað starv
- Eitt sjálvstøðugt arbeiði har tú fært møguleika at royna teg sjálva/n fult út
- Eitt arbeiðspláss har hýrurin er góður og áhugin fyri arbeiðinum stórur
- Møguleika fyri fakligari menning
- Løn sambært avtalu
- Byrja verður eftir avtalu

Er hetta nakað fyri teg, ella ynskir tú fleiri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum:

Jacob Rummelhoff, deildarleiðari.
Tel 582028

**MIKLAGARÐUR**



## Vit leita eftir 13 eldsálum

**Nýggi Frítíðarskúlin í Hoyvík letur upp eftir summarfrítíðina**

Vit hava brúk fyri 13 eldsálum at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

### Hevur tú hug at:

- seta tín dám á stovnin?
- skapa mennandi, avbjóðandi og tryggar karmar fyri børnini?
- menna pedagogiska arbeiði í stovninum, har barnið er miðdepilin?
- arbeiða sjálvstøðugt og í toymi?

### Vit bjóða

- ein nýggjan frítíðarskúla.
- ein frítíðarskúla, har gerandisdagurin í skúla og frítíðarskúla er ein samanhangandi eind.

### Vit leggja dent á

- at frítíðarskúlin er mennandi fyri børnini.
- ítróttarligt og skapandi virksemi innan- og uttandura.

### Søkt verður eftir

- einum varaleiðara at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. august 2006 ella eftir nærri avtalu.
- sjey pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.
- fýra hjálparfólkum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum verkstaðarleiðara at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 7. august 2006.

### Vit vænta, at tú

- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum.
- hevur royndir at arbeiða við børnum.
- er positiv/ur og umsorgarfull/ur.
- dugir at síggja møguleikar heldur enn forðingar.
- er kreativ/ur.
- dámar at vera úti við børnunum.
- virðir veikar og sterkar síður hjá børnunum.
- er nærverandi og tekur ábyrgd.
- tekur lut í at byggja upp ein nýggjan frítíðarskúla og leggur lunnar undir ein gott samskifti við aðrar samstarvsbólkar.
- sýnir virðing fyri øllum fakbólkum, bæði pedagogum, lærarum og hjálparfólkum.

### Setanarviðurskifti

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### Umsókn

saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar Kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi seinasta lagi fríggjadagin 7. juli 2006.

### Meiri fæst at vita

um størvini við at venda sær til Levi Mørk, stovnsleiðara tlf. 585739 ella 210126.

**Lesið um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

REPROZ